LM-136/2020

Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,
FR-100 Tórshavn. Tlf.316973. fsn@fsn.fo www.fsn.fo

Fyrbiskjal 3.

Tórshavn tann 25-03-2021

Hoyringsskriv

Uppskot til Løgtingslóg um Veiðigjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin)

Føroya Skipara - & Navigatørfelag (FSN) hevur hesar viðmerkingar:

Vit hava lisið nevnda uppskot og viðmerkingarnar til lógaruppskotið og uppritið "Almennar viðmerkingarnar".

Føroya Skipara-& Navigatørfelag hereftir nevnt (FSN) skal gera vart við, at FSN tekur á ongan hátt undir við nøkrum slag av tilfeingisgjøldum, sum verða trekt av frá skipara við manning.

FSN er av tí fatan, at rættindahavarin/kvotueigarin - rættindahavarar/kvotueigarar, sum eiga og hava rættindi til kvoturnar, eiga at rinda alt veiðiavgjaldið/tilfeingisgjaldið.

FSN hevur eisini viðmerkingar til ymisku greinarnar í uppskotinum til Løgtingslóg um veiðiavgjøld fyri fiskiskip (Veiðigjaldslógin).

Skylda at rinda veiðigjald

§ 1. Greinin sigur greitt:

"Eigari av fiskifari, undir føroyskum flaggi, sum veiðir av rættindum, Føroyar, ráða yvir, skal rinda veiðigjald av veiði av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum".

Hetta kann ikki skiljast annaðleiðis, enn at tað er bara eigarin/ábyrdarin av fiskifarinum og sum fiskar av rættindum, sum Føroyar ráða yvir, sum skal gjalda ásettu veiðiavgjøld.
Hetta veiðiavgjaldið eigur ikki at verða trekt av við " kassa eitt" men longur inni í rokniskapinum hjá tí einstaka reiðarínum.

Útrokning av veiðigjaldi

§ 9. FSN er av tí fatan, tá tað kemur til at krevja inn veiðiavgjald, so er tað rættari at brúka nevnda uppskot við stigvísum prosentparti av søluprísinum fyri ymisku fiskasløgini, heldur enn fast oyra/krónugjald, pr. kg.fisk.

Innkrevjing

§ 12. *Veiðigjaldið fellur til gjaldinga,r so hvørt, veiðan er landað.*

FSN mælir til, at veiðuavgjaldið verður kravt inn á annan hátt, enn trekt av landingarsølu virðinum. Grundin fyri tí er, at hetta er at gera seg inn á sáttmálan millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara.

Uppboðssøla av veiddum fiski

FSN vil heita á polittiska valdið, um at broyta lógina soleiðis, at pelagisku fiskasløgini "eftir tey eru fiskað" kunna bjóðast út um eina uppboðssølu, har hann hevur største søluviðri, hetta fyri at umgangast vertikal inntigratións trupulleikanum.

Vegna

Føroya Skipara- & Navigatørfelag
Annfinnur Garðalíð, formaður